


## P/F Vága Floghavn søkir eftir projektmedarbeiðara

Projektið við at leingja flogvøllin er nú boðið út, og projektering av farstøð v.m. stendur fyri framman, samstundis sum arbeiðið uppá leingingina verður framt. Í hesum sambandi hevur Vága Floghavn tørv á einum projektmedarbeiðara á byggiharrasíðuni.

Projektmedarbeiðarin kemur í samstarvi við projektsamskiparan at taka sær av

» at fylgja arbeiðinum við leinging av vøllinum
» at samstarva og samskipa á markamótum við myndugleikar, jørðeigarar, rakstrarpartin av Vága Floghavn o.o., so projektið kann ótarnað ganga sína gongd
» at tryggja at neyðugar avtalur og loyvi eru tøk, so hvørt sum tørvur er á teimum
» at hava yvirskipað eftirlit við arbeiðinum í samstarvi við byggileiðsluna
» at skipa fyri, at allar avtalur við arbeiðstakaran verða gjørdar til tíðina
» regluliga rapportering um gongdina
» umframt aðrar uppgávur í sambandi við virksemið hjá Vága Floghavn

**Førleikakrøv**
Tann rætti umsøkjarin

» hevur útbúgving sum verkfrøðingur ella byggifrøðingur innan bygging/anlegg, ella hevur aðra hóskandi útbúgving
» hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
» hevur royndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum innan leiðslu og eftirlit av húsbygging og anlegsarbeiði, gjarna frá byggiharrasíðuni
» hevur kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál

**Løn og setanartreytir**
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2010, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Einar Brimnes á telefon 354400 ella teldupost eibr@floghavn.fo

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 01. februar 2010. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Dávid Reinert Hansen,
P/F Vága Floghavn
380 Sørvágur

Ella við neyðugum fylgiskjølum til teldupost drh@floghavn.fo




BÓKHALD · SKULDARARØKT · RÁÐGEVING · SKATTAUPPGERÐ

Vit hava økt um okkara starvsfólkahóp og kunnu tí aftur taka ímóti nýggjum kundum.

Sp/f RannTeld hevur sera drúgvar royndir innan roknskap, bókhald, skuldara- og ognararøkt, MVG- og skattauppgerðir, ráðgeving og líknandi.

Vit hava orð á okkum fyri at vera nærløgd og góð í ráðum, – og prísirnir eru sera rímuligir!

Hava tygum tørv á hjálp innan omanfyri nevndu økir, eru tygum vælkomin at ringja ella at støkka inn á gólvið til eitt óbindandi prát og/ella ein góðan drekkamunn!



bókhaldsvirkið RannTeld

Bókhaldsvirkið við Atla Klein Olsen

Sosialurin / KvR 34 18 00



www.skulin.fo/adv

Adventistaskúlin

# Innskriving til 1. flokk

**Innskriving** til komandi 1. flokk í Adventistaskúlanum verður hósdagin 21. januar kl. 17:00 - 18:00 í lærarastovuni í nýggja bygninginum

Vinarliga, havið dóps- ella navnaseðil við.

**Enn eru pláss eftir, sjálvt um tú ikki hevur skrivað teg upp.**

Ynskir tú fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til skúlaleiðaran **Janne Schantz Johnsson** á tel. 31 32 60 ella 22 50 54

**Um skúlan**

**Adventistaskúlin er ein kristin frískúli, sum leggur dent á:**

- lesing, skriving og rokning
- tryggar umstøður í smáum flokkum
- fjølbroytta virkisskrá fyri alt árið
- gott foreldrasamstarv

Sosialurin / KvR 34 18 00



Hoyvíksvegur 56 · 100 Tórshavn · Tel. 31 32 60 · sdaskuli@olivant.fo